## Norðmenn nei til ES

Var fólkaatkvøða í Noregi í dag um limaskap í Evropasamveldinum, høvdu 58 prosent atkvøtt ímóti limaskapi, og 42 prosent høvdu atkvøtt fyri. Tað vísir ein nýggj meiningakanning, sum blaðið Aftenposten hevur latið gera. Úrslitið er júst tað sama sum í einari tilsvarandi kanning fyri einum hálvum ári síðani. Tann nýggja kanningin vísir, at teir norsku menninir eru meiri jaliga sinnaðir enn kvinnurnar, tá tað snýr seg um limaskap í Evropasamveldinum. Eisini vísir kanningin, at mótstøðan ímóti limaskap ií ES er serliga stór í Norðurnoregi.



## Keypmannahavn fyrra stigið

Danmark, USA og Kina eru samd um, ai arbeiðið fyri einari bindandi veðurlagsavtalu skal takast í tveimum stigum, og at tað fyrra skal takast í Keypmannahavn í desember. Lars Løkke Rasmussen hevur hitt Barack Obama og Hu Jintao í Singapore, har leiðararnir við Kyrrahavið hava hildið fund. Teir tríggir ásannaðu, at stundir eru ikki til at semjast um eina løgfrøðiliga bindandi avtalu í Keypmannahavn, men at avtalan skal takast í tveimum stigum. Sostatt verður ráðstevnan í Keypmannahavn tað fyrra stigið. 192 lond hava fingið innbjóðing at senda umboð til Keypmannahavnar, og higartil hava 40 sagt ja takk.

# Skipaeftirlitið kannar vanlukkuna

**Meðan spurnartekin hevur verið sett við tilbúgvingina eftir vanlukkuna umborð á Polarhav hóskvøldið, er Skipaeftirlitið eisini farið at kanna umstøðurnar umborð tá vanlukkan hendi**

TRYGD
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Skipaeftirlitið skal seta kanningar í verk, tá vanlukkur henda umborð á skipum. Kanningin av vanlukkuni umborð á Polarhav er farin í gongd, váttar stjórin*

*Mynd: Savnsmynd*

Hósvkvøldið hendi ein syndarlig vanlukka umborð á ísfiskatrolaranum Polarhav, har ein maður lat lív.

Bjargingartyrlan fekk ikki farið eftir manninum, og spurnartekin hevur verið sett við tilbúgvingina. Eitt nú hava Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið funnist at tilbúgvingini, og hava róð uppundir, at tað er ein følsk trygd, sum sjófólk kring Føroyar hava.

Hin síðan av málinum er, um trygdin umborð á skipunum er nóg góð.

Skipaeftirlitið umsitur málsøkið »Trygd á sjónum« og skal seta kanning í verk, tá vanlukkur henda á sjónum. Tað arbeiðið er longu farið í gongd, váttar stjórin á Skipaeftirlitinum, Vilhjálmur Gregoriussen.

- Vit hava verið umborð og hava tosað við manningina. Vit kanna allar umstøðurnar, sum hava gjørt seg galdandi í samband við vanlukkuna, sigur Vilhjálmur Gregoriussen.

Tað hevur ljóðað, at fleiri skip vóru á somu fiskileið hetta kvøldið, og at mestsum øll lógu bakk, orsakað av veðri. Sambært Vilhjálmi Gregoriussen, so verður eisini hugt upp á veðrið, og um ov nógv verður lagt fyri.

- Tað er ein náttúrligur partur av kanningararbeiðinum at kanna, hvussu veðrið hevur spælt inn, váttar stjórin á Skipaeftirlitinum.

### Skipari og reiðari felags ábyrgd

Nú fíggjarligu karmarnir eru blivnir trengri í øllum vinnum, og tað kanska serliga trýstir á skógvarnar í fiskivinnuni, er ikki óhugsandi at skiparar kenna seg undir trýsti frá reiðarunum fyri at fiska, og at hetta kann fáa summar skiparar at leggja alt ov nógv fyri, meðan teir eru undir fiskiskapi.

Tá so ein vanlukka hendir, verða eyguni vend móti skiparanum, men sambært stjóranum á Skipaeftirlitinum er ábyrgdin fyri trygdini hjá sjófólkunum ikki skiparans eina.

- Bæði skiparin og reiðarin hava ábyrgdina av, at trygdin umborð á skipunum er nóg góð, og at sjófólkini ikki verða sett í vanda. Teir hava sostatt eina felags ábyrgd fyri, at trygdin á sjónum er í lagi, staðfestir Vilhjálmur Gregoriussen.

### Tekur tíð at kanna

Nær kanningarúrslitið fyriliggur, vil Vilhjálmur Gregoriussen ikki gita um.

Hann vísir á, at Skipaeftirlitið, eins og aðrir almennir stovnar, eisini koyrir við skerdari manning.

- Vit eru sjálvi skerd, og kanningar hava tikið longri tíð at gjørt í seinastuni. So eg fái ikki sagt, nær kanningin er liðug, og ein niðurstøða fyriliggur, staðfestir hann.

# Móttøka fyri svimjarunum

**Føroysku World-Cup svimjararnir koma á Farstøðina í Havn klokkan 15.15 í dag.**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroysku svimjararnir komu við flogfari til Vágar klokkan 14 í dag, og ætlandi kemur hópurin á Farstøðina í Havn klokkan 15.15. Og har verður skipað fyri móttøku.

Svimjararnir, sum hava verið í World Cup-kapping hesa seinastu vikuna, eru Pál Joensen, sum á ferðini vann eitt gull- og tvey silvurmerki, umframt at hann tríggjar ferðir setti norðurlendskt met á 1.500 metrum.

Shailamillum Garðarnar, sum kappaðist í 50 og 100 metra frí.

Mona Simonsen, sum kappaðist á 400 og 800 metra frí.

Og Pauli Øssurson Mhor, sum kappaðist á 50 og 100 metra frí. Í báðum førum við persónligum meti sum úrsliti.

Venjari hjá liðnum er Jón Bjarnason og leiðari og fysioterpeut er Thurid Kjærbo.

*Móttøka verður fyri føroysku World Cup svimjarunum í dag*

